# VIÐTØKUR

# FYRI

# P/F Føroya Banki

**1.0 Navn**

1.1 Navn bankans er "P/F Føroya Banki".

1.2 Bankin rekur eisini virksemi undir niðanfyri ásettu hjánøvnum:

Bankivik, Norðoya Banki, Sjóvinnubankin, Føroya Bank, Foroya Banki, Foroya Bank, BankNordik, BankNordic, Nordik Bank, Nordic Bank, Nordik Banki, Nordic Banki, Pensjón Nordik, Pension Nordik, Trygd Nordik, Invest Nordik, NordikInvest og Nordik Íløgur.

**2.0 Heimstaður**

2.1 Heimstaður bankans er í Tórshavnar Kommunu.

**3.0 Endamál**

3.1 Endamál bankans er at reka bankavirksemi og annað sambært lóg um fíggjarvirksemi (lov om finansiel virksomhed) loyvt virksemi.

**4.0 Kapitalur**

4.1 Partapeningur bankans er 192 milliónir krónur býttur sundur í partabrøv upp á 20 krónur.

**5.0 Partabrøv**

5.1 Partabrøv bankans verða at útskriva til handhavara, men kunnu verða skrásett við navni í partabrævabók bankans.

5.2 Avhending av partabrøvum, skrásett við navni, hevur bert gildi mótvegis bankanum, tá ið avhendingin er skrásett í partabrævabók bankans. Bankin hevur onga ábyrgd av rættleika og gildi av avhendingini.

5.3 Partabrøvini eru umfarsskjøl.

5.4 Einki partabræv hevur serstøk rættindi.

5.5 Ongar avmarkingar eru galdandi fyri sølu av partabrøvum.

**6.0 Aðalfundur, mynduleiki, staður og boðan**

6.1 Aðalfundurin er hægsti mynduleiki í øllum viðurskiftum bankans innan teir í lóggávuni og hesum viðtøkum settu karmar.

6.2. Aðalfundir bankans verða hildnir í Tórshavn. Ársaðalfundurin verður hildin innan 3 mánaðir eftir lokið roknskaparár.

Nevndin hevur heimild til at taka avgerð um, at aðalfundir bankans verða hildnir sum fullfíggjaðir talgildir aðalfundir, treytað av at aðalfundirnir kunnu fullførast á fullgóðan hátt í samsvari við partafelagslógina. Partaeigarar kunnu luttaka, bera fram sínar áskoðanir og atkvøða talgilt.

Nærri kunning um mannagongdir fyri skráseting og luttøku skal vera atkomulig á heimasíðu bankans umframt í innkallingini til aðalfundin.

6.3. Eykaaðalfundur verður hildin eftir avgerð hjá aðalfundinum, nevndini ella grannskoðaranum, ella eftir áheitan frá partaeigarum, ið eiga í minsta lagi 5% av partapeninginum. Áheitanin frá partaeigarunum skal skrivliga latast nevndini við tilskilan av evni, sum ynskist viðgjørt.

Boðast skal til eykaaðalfundar innan 14 dagar eftir at áheitanin er móttikin.

6.4 Nevndin boðar til aðalfundar við í mesta lagi 5 viku og í minsta lagi 3 viku freist. Aðalfundarinnkallingin verður almannakunngjørd á heimasíðu bankans umframt umvegis KT-skipan Skráseting Føroya. Harumframt verður skrivlig innkalling send teimum partaeigarum, sum eru skrivaðir í eigarabók bankans, og sum hava umbiðið hetta.

6.5 Fundarskráin skal tilskilast í fundarfráboðanina. Verða uppskot sett fram, sum krevja serstakan meiriluta fyri at verða samtykt, skal høvuðsinnihaldið í uppskotinum eisini tilskilast í fráboðanina.

**7.0 Aðalfundur og dagsskrá**

7.1 Partaeigari hevur rætt at fáa ávíst evni viðgjørt á ársaðalfundinum. Uppskotið skal verða latið felagnum seinast 6 vikur áðrenn aðalfundin. Er uppskotið komið seinni enn 6 vikur áðrenn aðalfundin, kann nevndin tó avgera, at uppskotið er komið í so góðari tíð, at uppskotið kortini verður viðgjørt á ársaðalfundinum.

7.2 Í seinasta lagi 3 vikur undan aðalfundinum og fram til og við aðalfundardagin, verður á heimasíðu felagsins lagt fram avrit av innkallingini við dagsskrá, fullfíggjað uppskot og skjøl, sum verða løgd fram á aðalfundinum, upplýsingar um atkvøðu- og kapitalviðurskifti, sum hesi eru, tá innkallað er, umframt oyðubløð, sum skulu nýtast við fulltrúa- og brævatkvøðu.

Ársfrásøgn verður send øllum partaeigarum, ið eru skrásettir við navni, og sum hava sett fram áheitan um tað.

7.3 Ársaðalfundurin hevur hesa dagsskrá:

1. Frágreiðing nevndarinnar um virksemi bankans í farna ári.

2. Framløga av ársfrásøgn – og møguligum konsernroknskapi – við grannskoðaraátekning til góðkenningar og ársfrágreiðing.

3. Avgerð um nýtslu av avlopi ella rindan av halli sambært góðkenda ársfrásøgn.

4. Val av nevndarlimum.

5. Val av grannskoðara / grannskoðarum.

6. Innkomin uppskot.

7. Ymiskt.

**8.0 Aðalfundur, atgongumerki og atkvøðurættur**

8.1 Rættur partaeigarans at luttaka á aðalfundi og at atkvøða í sambandi við partabrøv síni, verður ásettur í mun til tey partabrøv, sum partaeigarin eigur skrásetingardagsetingina. Skrásetingardagsetingin er ein vika, áðrenn aðalfundurin verður hildin.

8.2 Hvør partaeigari, sum hevur rætt at luttaka á aðalfundi, jvb. § 8. 1, og sum ynskir at luttaka, skal seinast 3 dagar undan aðalfundinum biðja um atgongumerki og atkvøðuseðil til aðalfundin.

8.3. Hvørt partabræv gevur eina atkvøðu. Uttan mun til hvussu stóran part ein partaeigari eigur tilsamans av partapeninginum, kann hann fyri egin partabrøv ella sum fulltrúi fyri aðrar partaeigarar, ikki atkvøða fyri meira enn svarandi til 10% av partapeninginum tilsamans. Ongar avmarkingar eru fyri fulltrúir til nevndina. Uttan mun til hvussu stóran part teir eiga tilsamans av partapeninginum, kunnu partaeigarar innan fyri somu konsern, soleiðis sum hetta hugtak er ásett í lóggávuni, ikki saman atkvøða fyri meira enn svarandi til 10% av partapeninginum tilsamans.

8.4 Partaeigarar hava rætt til sjálvir at luttaka á aðalfundinum, saman við einum ráðgeva ella við fulltrúa, ið kann atkvøða hansara vegna, móti at løgd verður fram skrivlig og dagfest fulltrú, ið er givin fyri eitt tíðarskeið, sum ikki er longri enn eitt ár.

8.5 Fjølmiðlarnir hava atgongd til aðalfundin.

**9.0 Aðalfundur, fundarstjóri, avgerðir og gerðabók**

9.1 Aðalfundurin verður stjórnaður av einum av nevndini tilnevndum fundarstjóra, ið tekur avgerð í øllum spurningum um viðgerð av málunum, atkvøðugreiðslurnar og úrslitum teirra.

9.2 Á aðalfundinum verða øll mál avgjørd við vanligum atkvøðumeiriluta, uttan so at partafelagslógin ella hesar viðtøkur krevja serstakan meiriluta.

Uppskot um broytingar av viðtøkum bankans og uppskot um sjálvbodna avtøku og fusión kunnu bert samtykkjast, um uppskotið verður samtykt við í minsta lagi 2/3 av bæði greiddum atkvøðum og tí á aðalfundinum við atkvøðurætti umboðaða partapeninginum og treytað av, at minst 2/3 av partapeninginum er umboðaður á aðalfundinum.

9.3 Uppskot frá Føroya Landsstýri um broyting av ella fráfalli av quorum-kravinum í pkt. 9.2 kunnu samtykkjast við í minsta lagi 2/3 av bæði greiddum atkvøðum og tí á aðalfundinum við atkvøðurætti umboðaða partapeningi. Avmarkingarnar í pkt. 8.3 og pkt. 9.2 viðvíkjandi atkvøðu og fulltrú eru í hesum føri ikki galdandi.

9.4 Gerðabók verður skrivað um tað, sum fer fram á aðalfundinum. Hon verður undirskrivað av fundarstjóranum.

**10.0 Nevnd**

10.1 Nevndin verður vald á aðalfundinum, undantikið teir limir, sum verða valdir sambært reglunum í lóggávuni um starvsfólkaumboðan í nevndini.

10.2 Aðalfundurin velur eina nevnd við 4-6 limum. Aðalfundarvaldir nevndarlimir verða valdir fyri eitt 2 ára tíðarskeið. Tó soleiðis at helmingurin av aðalfundarvaldu nevndarlimunum standa fyri vali hvørt ár. Afturval er loyvt.

10.3 Nevndin skipar seg eftir ársaðalfundin og velur ein forman og ein næstforman. Stendur á jøvnum, verður valið avgjørt við lutakasti.

10.4 Formaðurin boðar til nevndarfundar ella, um hann er burturstaddur, næstformaðurin. Boðað verður til fundar, tá ið formaðurin ella, um hann er burturstaddur, næstformaðurin metir, at tað er neyðugt, ella um ein nevndarlimur, stjórnarlimur ella grannskoðari biður um tað.

10.5 Nevndin er viðtøkufør, tá ið meiri enn helmingurin av øllum nevndarlimum eru møttir. Mál, sum verða viðgjørd í nevndini, verða avgjørd við vanligum atkvøðumeiriluta. Stendur á jøvnum, ræður atkvøða formansins ella næstformansins, um formaðurin er burturstaddur.

10.6 Gerðabók verður skrivað um tað, sum fer fram á nevndarfundum. Hon verður undirskrivað av nevndarlimunum.

10.7 Nevndin skal í starvsreglugerð áseta nærri reglur um útinnan av arbeiði sínum.

**11.0 Stjórn**

11.1 Til at stjórna dagligu leiðsluni av virksemi bankans setur nevndin eina stjórn, sum hevur 1-3 stjórnarlimir.

11.2 Verða fleiri stjórar settir, skal ein teirra setast sum forstjóri.

11.3 Gjørdar eru yvirskipaðar leiðreglur fyri incitamentssamsýning av nevnd og stjórn bankans. Hesar leiðreglur eru samtyktar á aðalfundi bankans og almannakunngjørdar á heimasíðu bankans.

**12.0 Tekningarreglur**

12.1 Bankin verður bundin við undirskrift av samlaðu nevndini, av nevndarformanninum og næstformanninum í felag, ella av nevndarformanninum ella næstformanninum saman við einum stjóra ella einum nevndarlimi.

12.2 Nevndin kann veita umboðsfulltrú og serfulltrú.

**13.0 Roknskaparár**

13.1 Roknskaparárið er álmanakkaárið.

13.2 Ársfrásøgn skal geva eina rættvísandi mynd av ogn og skuld bankans, fíggjarligu støðuni og úrslitinum.

13.3 Aðalfundurin kann við vanligum atkvøðumeiriluta gera av, at ársfrásøgn bankans verður sett upp og latin á enskum.

**14.0 Grannskoðan**

14.1 Àrsfrásøgn bankans verða grannskoðaðir sambært galdandi lóggávu av einum ella fleiri grannskoðarum, sum verða valdir fyri eitt ár í senn.

Hesar viðtøkur, sum vóru samtyktar á aðalfundi í P/F Føroya Banka tann 28. september 1999, eru seinast broyttar á aðalfundi tann 26. mars 2026.

****

Nevndin

Birgir Durhuus — Annfinn Vitalis Hansen

Kristian Reinert Davidsen — Árni Tór Rasmussen

Marjun Hanusardóttir — Tom Ahrenst

Kenneth M. Samuelsen — Svend Jacobsen

Oliver Granhøj